# FM í MTB verður leygardagin

Komandi leygardag skipar Tórshavnar Súkklufelag fyri fjallasúkkling fyri unglingar og vaksin. Fyrireikararnir hava avgjørt, at kappingin leygardagin eisini verður uppi við Føroya Studentaskúla í Hoydølum. Sunnudagin bleiv kappast í MTB Criterium, sum er fjallasúkkling har koyrt verður runt á einum lítlum teini t.d. 45 minuttir. Komandi leygardag verður kappast í sokallaðu MTB Cross Country, har kappast verður á einum ávísum teini, t.d. 40 km. Leygardagin verður eisini koyrt fleiri ferðir ein ávísan tein, men hesin teinur er nógv longri enn Criterium teinurin.



# Ein klokkutíð til allar dystirnar

Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av, dystirnir í teimum báðu deildunum skulu spælast samstundis seinastu umførini. Í Formula-deildini verður spælt klokkan 15 á øllum støðum bæði nú sunnudagin og 19. oktober, meðan dystirnir í seinasta umfarinum – 25. oktober – verða spældir klokkan 15.30. Í 1. deild eru allir dystir tann 12. oktober klokkan 14.30. 18. oktober verður spælt klokkan 15, og í seinasta umfarinum – 25. oktober – verður spælt klokkan 13.

HB-NSÍ:

# Europa stendur upp á spæl

**Alt bendir á, at dysturin um seinna UEFA-Cup plássið stendur millum HB og NSÍ, og avgerðin um hetta kann væl fella sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast matematiska vissan enn ikki er til staðar, so bendir alt á, at EB/Streymur vinnur Formula-gullið í ár.

Tað inniber samstundis, at B36 fær UEFA-Cup plássið fyri steypavinnarar, og og verður tað upp til HB og NSÍ at stríðast um seinna UEFA-plássið, sum er vert nakað nógv meira enn eitt pláss í InterToto-kappingini.

Og tí kann væl sigast, at nakrar hundraðtúsund krónur standa upp á spæl, tá liðini fara á vøllin sunnudagin.

Og til hetta eru bæði á leið somikið væl fyri, sum hugsast kann. Eingir skaðar av týdningi gera um seg í nakrari av legunum, og heldur ikki eru nøkur leikbann at stríðast við, so venjararnir hava so at siga allar mans tøkar, tá liðini skulu setast.



*Hóast gullið uttan iva var málið hjá bæði HB og NSÍ, so eru schweizarafrankarnir hjá UEFA avgjørt eisini nakað, sum vert er at stríðast fyri, tá liðini møtast sunnudagin*

B71-B68:

# Skulu venda gongdini

**Seinastu vikurnar hevur millum lítið og einki riggað hjá B71. Skulu teir eisini spæla sunnudagsbólt í 2009 skulu stig á borðið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er á heimavølli, at B71 hevur staðið seg best, og tí er eingin ivi um, hvørjar ætlanirnar eru, nú B68 vitjar.

Toftamenn fóru fyrr í ár úr Traðardali við øllum stigunum, og við verandi formkurvu í huga er ikki óhugsandi, at teir hava somu ætlanir sunnudagin, nú teir síggja sær møguleika at vinna seg eitt pláss upp á stigatalvuni.

Hjá B71 ræður kanska fyrst og fremst um at finna spæligleðina og stríðsviljan, sum púrasta hevur restað í seinastu umførini. Í so máta kann tað muna væl, at Eirikur Poulsen og Gudmund Nielsen nú aftur er tøkir. Nakað sum ger, at B71 fyri fyrstu ferð í trý umfør ikki er rakt av leikbanni til lyklaspælarar.

Hjá B68 hevur Ndende leikbann, eins og Jóan Símun Edmundsson er burturstaddur í U19-ørindum, og tí noyðist Bill McLoud Jacobsen at gera onkra broyting í mun til liðið, sum hevur staðið seg so væl seinastu vikurnar.

# Nýklassikari á Skála

**VÍF hevur tað altíð trupult á Skála, har teir leygardagin skulu royna at verja góðu byrjanina**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við greiða sigrinum á Neistanum gav VÍF seinasta sunnudag tekin um, at teir avgjørt vilja spæla við har, sum VÍF so ofta hevur gjørt um seg. Nevnliga í oddinum.

Liðið, sum í fjør var undir mest sum enduruppbygging, hevur nú fingið nakrar royndu profilunum við aftur, og spurningurin er so, um hesir megna at lyfta seg upp aftur á tindarnar.

Ein ábending um hetta fæst kanska á Skála, har VÍF sjáldan hevur havt nakra lætta uppgávu seinastu nógvu árini. StÍF tykist viknað nakað í ár, men teir vunnu fyrsta dystin í Kollafirði, og tí er einki at ivast í, at teir eisini ætla sær stigini hesaferð, hóast uppgávan avgjørt ikki er av tí lættara slagnum.

Í Havn og í Hovyík eru ávikavist Neistin og H71 greiðir favorittar, tá tey spæla sínar dystir. Hjá Neistanum var talan um vónbrot, tá teir komu aftur úr Vestmanna við ongum, og tað vilja teir heilt víst skal ganga útyvir Kyndil, sum ikki fekk nakra serliga góða byrjan við stórtapinum móti H71.

Og júst tann dysturin gevur ábendingar um, at hoyvíkingar í ár rokna við onkrum stórum, og móti KÍF eiga hoyvíkingarnir neyvan at gera sær tilveruna alt ov trupla.



*Á pappírinum má VÍF roknast sum favorittur, men júst á Skála hevur VÍF havt tað meira enn vanliga trupult seinasta 10-ára skeiðið ella so*